Methøgi oljuprísurin:

# Køvir batnandi fiskiskap og batnandi fiskaprísir

**- Hóast ábendingar eru um hækkandi fiskaprísir og betri fiskiskap seinastu tíðina samanborið við somu tíð í fjør, vil methøgi oljuprísurin í ár kortini gera, at raksturin hjá fiskiskipaflotanum helst verður nakað lakari í ár enn í fjør, heldur Rasmussen & Weihe**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Roknskapargreiningin hjá grannskoðarafelagnum, Rasmussen & Weihe, sum løgd varð fram á fundi á Hotel Hafnia týsdagin, lýsir eisini í síni niðurstøðu teir ymisku skipabólkarnar við fáum orðum.

Á hesi síðuni fara vit at endurgeva ein part av tí, sum felagið er komið til, vísandi til gongdina árini 2000-2004 og við útlitum fyri árið 2005, sum skjótt er umliðið.

Í frágreiðingini verður eisini víst til hagtøl, sum grannskoðarafelagið hevur fingið frá Føroya Fiskimannafelag.

- Sambært hesum tølum er samlaða veiðinøgdin í tíðarskeiðnum, januar-september 2005, minkað við umleið 12% samanborið við sama tíðarskeið í 2004.

### Oljan trýstir

Víst verður á, at miðalprísurin á ráfiski í sama tíðarskeiði sum heild er hækkaður, men kortini er samlaða veiðivirðið minkað við sløkum 10% teir fyrstu níggju mánaðirnar í ár.

- Hóast ábendingar eru um hækkandi fiskaprísir og betri fiskiskap seinastu tíðina samanborið við somu tíð í fjør, vil methøgi oljuprísurin í ár kortini gera, at raksturin hjá fiskivinnuni helst verður heldur lakari í ár enn í fjør, heldur Rasmussen & Weihe.




*Hóast nógv tøl vór›u víst á skíggjanum yvir gongdina hjá fiskiskipaflotanum, var framløgan hjá Rasmussen & Weihe týsdagin ógvuliga áhugaverd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Pelagisku skipini eru væl fyri, men langt er á mál hjá rækjuskipunum

**- Pelagiski flotin er væl konsolideraður og er sum heild væl fyri. Men støðan hjá rækjuskipunum er vánalig – og langt er á mál, sigur grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Olaf Olsen, sum í mong ár hevur verið reiðari og Jóan Magnus Lamhauge, sum starvast hjá Rasmussen & Weihe, lýða á framløguna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Grannskoðarafelagið lýsir sum nevnt eisini gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki, og fara vit í dag í stuttum at nerta við gongdina hjá pelagisku skipunum, sum eru í tí avgjørt betra endanum – og hjá rækjuskipum, sum tíverri mugu sigast at vera millum tey niðastu á "stiganum".

Í blaðnum í morgin fara vit at taka hinar skipabólkarnar, ið eftir eru.

Um gongdina hjá pelagisku skipunum og rækjuskipunum, sigur grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe í stuttum:

### Pelagisk skip

Pelagisku skipini høvdu eitt framúr gott ár í 2001, men í 2002 er úrslitið fallið munandi, og heldur afturgongdin fram í 2003 og 2004. Tó má 2004 metast sum eitt hampiligt ár.

- Flotin er væl konsolideraður og annars væl fyri sum heild.

Sambært Føroya Fiskimannafelag er miðalprísurin hjá pelagiskum skipum lækkaður nakað teir fyrstu 9 mánaðirnar í 2005 í mun til sama tíðarskeið í 2004. Samlaða veiðan er somuleiðis minkað nakað í sama tíðarskeiði.

- Miðalprísurin er hinvegin øktur munandi seinastu tíðina í mun til somu tíð í fjør, men nøgdin er nakað minni. Sambært teimum upplýsingum, sum vit hava fingið, verður samlaða veiðivirðið í 2005 umleið tað sama sum í 2004.

Grannskoðarafelagið vísir á, at við høgu oljuprísunum verður roknað við einum lakari úrsliti hjá hesum skipabólki í 2005 í mun til 2004.

### Rækjuskip

Rækjuflotin hevur havt nógv trupul ár á rað, og støðan er vánalig við árslok 2004.

- Tað er alt, sum bendir á, at rækjuvinnan hevur enn eitt vánaligt ár í 2005. Okkurt skip er farið av knóranum í ár, og okkurt er selt av landinum. Í løtuni eru bert tvey skip í vinnu.

Sambært hagtølum hjá Føroya Fiskimannafelag er miðalprísurin fyrstu níggju mánaðirnar í 2005 lækkaður nakað í mun til 2004, og nøgdin er í sama tíðarskeiði minkað munandi.

- Í seinastuni er prísurin á kókaðum rækjum hækkaður nakað í mun til somu tíð í fjør, men munandi broytingar skulu til, áðrenn verandi rækjufloti fær javnvág í rakstrinum. Enn er langt á mál, staðfestir grannskoðarafelagið í roknskapargreiningini.



*Teir lurta eftir Bjarna Poulsen, sum saman við Sjúrði Johannesen, hegnisliga stóðu fyri framløguni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*